# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvør stýrir Eik?

Í hesum døgum, har fíggjarligu brotasjógvarnir bróta yvir okkara bankakervi, so kunnu spurningar setast við bankaleiðslur so at siga allastaðni. Eisini í Føroyum.

Óivað eru nógvar orsøkir til verandi trupulleikar uttanfyri tað, sum nevnd og stjórn í einum føroyskum banka kunnu hava ávirkan á. Tó síggja vit, at danska Fíggjareftirlitið setir spurnartekin við leiðsluna í ávísum donskum bankum og sparikassum. M.a. verður sagt, at tað er umráðandi, at peningastovnar fáa professionellar nevndir. Hetta má merkja, at tað eru nevndir í bankum og sparikassum í danska ríkinum, sum, heldur enn at verða professionellar partafelagsnevndir, bera dám av at vera frítíðarfelagsnevndir, har limir verða valdir eftir øðrum kriterium enn fakligum kunnleika og royndum.

Hvussu er statt við tí her hjá okkum? Eik hevur júst lagt fram eitt sera vánaligt úrslit fyri 2008. Gamaní er partur av orsøkini ein heimskreppa, men ikki skerst burtur, at sitandi nevndin í Eik er tann nevndin, sum hevur mist mest pengar nakrantíð. Tí var væntandi, at onkur avleiðing varð tikin av hesum t.d. við at broyta nevndarsamanseting og kanska eisini stødd av nevnd. Men so var ikki.

Hetta er ikki álitisvekjandi í einari tíð, har alment álit á bankar og bankaleiðslur frammanundan er so sum so.

Um nevndin í Eik ikki heldur, at avleiðingar eiga at takast í hesum tíðum, so kemur tann stundin ongantíð. Tí er tað kanska uppá sítt pláss, at Fíggjareftirlitið hyggir at nevndini í Eik og hennara samanseting.

Fyrrverandi stjórin í Føroya Banka Jørn Astrup Hansen tosaði einaferð um harraleysu kassarnar í Føroyum, uttan at nevna nøkur ávís feløg. Tað er kanska ikki rætt av okkum at flokka Eik í henda bólk, men ikki kann sigast, at nevndin í Eik í løtuni ger nógv fyri at sleppa Eik undan at verða flokkað sum ein harraleysur kassi.

Tað er eisini óheppið, at sami formaður situr fyri nevndini í Eik og fyri nevndina í Eik grunninum. Hetta gevur, rætt ella ikki, ein varhuga av, at grunnsins áhugamál verða sett í aðru røð.

Ikki er vist, at ein fullkomin útskifting ella ein fullkomin kollveltan av nevnd og leiðslu í Eik er svarið, men einki at gera, er ikki vegurin fram. Marknaðurin finnur seg ikki í tí. Tað váttar partabrævavirðið á Eik.

Vónandi taka partaeigarar og nevnd í Eik sær um reiggj, so sleppast kann undan varhugan av, at talan veruliga er um ein harraleysan kassa.

**Sosialurin**

## Russar takka fyri jólapakkar

**ÁRNI DAM**

Faroe Agancy





Aftur í ár hevur Føroya fólk latið umleið túsund jólapakkar til russiska sjófólkið, ið helt jól umborð á skipum sínum kring Føroyar. Russisku sjófólkini og reiðaríir teirra hava heitt á okkum um at senda Føroya fólki eina tøkk fyri stóra gestablídnið og gávumildnið. Øll tey nógvu fólkini og virkini, ið hava latið gávir eiga eina heilt serstaka tøkk.

Stórsinnið og gestablídnið kom eisini til sjóndar á hugnaliga jólahaldinum, ið Ebenezer skipaði fyri í sambandi við russisku jólini. Fyrireikararnir lótu dyrnar upp fyri teimum nógvu russisku sjófólkunum, sum hugnaðu sær ófført. Øll tey sum skipaðu fyri og hjálptu til eiga tøkk uppiborna. Eisini Skipasmiðjan, sum skipaði fyri flutningi av øllum sjófólkinum, ið var umborð á skipunum, ið lógu á Skála.

At føroyingar ikki smæðast at hjálpa, tá á stendur, kom veruliga til sjóndar fyrr í ár, tá manningin á russiska trolararanum "Ros" ikki slapp heim, eftir at skipið í mai 2008 varð tikið og ákært fyri ólógligan fiskiskap. Enn er avgerð ikki fallin í tí málinum. Høvdu reiðaríini hjá føroysku nótaskipunum og flakatrolarunum ikki bjóðað sær at goldið fyri at manningin slapp heim til Russlands, høvdu teir enn verið fangaðir umborð á skipinum við bryggjuna í Kollafirði.

Sum heiðurskonsul Russlands í Føroyum takki eg reiðaríunum fyri hetta. Eisini takki eg Jóhan Dahl, landstýrismanni við vinnumálum, fyri hansara hjálp í hesum máli.









*Myndir frá jólahaldinum í Ebenezer*

*Myndir: Óli Jacobsen*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.